# Fegin vinnari

**Karsten Ellerup gleðir seg til komandi ár, tá ið hann ætlar sær at verja heitið.**

STATOIL KRING FØROYAR
*Páll Holm Johannesen*

Vinnarin í Statoil Kring Føroyar kappingini í ár, Karsten Ellerup, var sum vera man fegin um úrslitið.
– Eg vónaði undan kappingini at enda millum tríggjar teir fremstu, so tað at vinna kappingina er bara einastandandi, segði Karsten Ellerup eftir kappingina.

Karsten Ellerup súkklar í fremsta bólkinum í Danmark, og tí hevur hann í mun til hinar súkklararnar í kappingini, nógvar royndir við at súkklukappingar, ið fevna um fleiri dagar. Í Danmark er tað bara í tí fremsta bólkinum at súkkla verður etapu-koyringar.

Spurdur um hvussu tað bar til, at hann hevði leitað sær til Føroyar, svaraði Karsten, at hann hevði lisið greinar í blaðnum Cykleren, sum høvdu róst kappingini, og tí valdi hann at koma upp til Føroya. Eisini var hann áhugaður at vitja Føroyar, og uppliva vøkru náttúruna, sum hann tók til.

Karsten var væl nøgdur við kappingina, og ikki minst karmarnar rundan um hana.

– Eg havi onkið at seta fingur á, og tit kunnu vera vís í, at eg verið her aftur næsta ár at verja heitið.

Strævnasti teinurin i kappingini, metti Karsten vera Eiðisskarð, og vísti á, at hann als ikki var vanur við súkklukappingar við so nógvari fjallakoyring.

– Í Danmark eru vit als ikki von við slíka fjallakoyring, men tað gekk væl kortini, og eri sera fegin um sigurin, legði Karsten Ellerup aftrat.



*Karsten Ellerup var sera fegin um sigurin í Statoil Kring Føroyar*
*Mynd: Finnur Justinussen*



*Bergur Johansen gjørdist yngsti súkklarin nakrantíð at gjøgnumføra Statoil Kring Føroyar*
*Mynd: Finnur Justinussen*

# Yngsti nakrantíð

**Ungu súkklarnir skulu longu í eldin aftur á Ólavsøku**

STATOIL KRING FØROYAR
*Páll Holm Johannesen*

Yngsti súkklarin nakrantíð at gjøgnumføra Statoil Kring Føroyar kappingina, gjørdist Bergur Johansen, tá hann kom á mál við Statoil- støðina í Gundadali sunnudagin.

Bergur er 13 ára gamal, og hann hevur súkklað í eitt gott ár. Bergur var sera fegin um, at honum hevði eydnast at gjøgnumføra kappingina.

– Hósdagin var eg fleiri ferðir við at geva upp, men eg helt á, og tað eri eg sera fegin um í dag, segði Bergur við Sosialin sunnudagin.

Umframt Berg, so kom 14-ára gamli Hans Krostein eisini á mál sunnudagin, og tað má sigast at vera sera flott avrik frá teimum báðum ungu súkklarunum. Ungi Dánjal Michaelsen var so óheppin at fáa pínu í ryggin, og kundi tí ikki vera við sunnudagin.

Bergur og Hans eru kappingarneytar í aldursbólkinum12-14 ár, og skulu longu á Ólavsøku kappast aftur.





*Gunnar Dahl-Olsen gjørdist fremsti føroyski súkklarin í ár, og endaði á einum samanløgdum fimta plássi í kappingini*

# – Á einari leið

**Besti føroyski súkklarin í kappingini, Gunnar Dahl Olsen, var ikki nøgdur við avrikið sunnudagin**

STATOIL KRING FØROYAR
*Páll Holm Johannesen*

Gunnar Dahl Olsen hevði undan kappingini sett nøsina uppeftir at endurtaka triðja plássið frá í fjør, men tað eydnaðist ikki honum í kappingini í ár. Samanlagt endaði Gunnar á einum fimta plássi, og tað var hann hampiliga væl nøgdur við.

- Fimta plássi samanlagt er á eini leið, men eg eri ikki nøgdur við avrikið í dag, segði Gunnar Dahl-Olsen við Sosialin sunnudagin eftir kappingina.

Gunnar greiddi eisini frá, at hann var væl nøgdur við kappingina sum eina heild, og hevði ta fatan, at útlendingarnir vóru væl nøgdir við kappingina í ár.

Spurdur um hvussu støðið í ár var í mun til undanfarin ár, segði Gunnar, at støðið var á leið tað sama sum í fjør. – Eitt nú var tíðin í einkultstartinum í ár betri enn hon var í fjør, so eg vil ikki siga at støðið er lækkandi, legði Gunnar aftrat.

